

## Nýggj hús í miðbýnum til sølu

Nýggj hús í miðbýnum, Nólsoyar Páls gøta 6, í 3 hæddum 3 x 50 m². Grundøki: 125 m². Húsini eru innrættaði sum 3 íbúðir á 50 m², ein á hvørji hædd.

Húsini eru BD60 brandbjálvað ímillum íbúðirnar, væl bjálvað og ventilarað við »luft til vatn« hitaanleggi. Húsini liggja í hugnaligum umhvørvi.

Kann seljast sum stakar íbúðir ella sum heil hús.

**Ring og spyr/frætt á tlf. 28 40 10 / 21 04 03**

Sí myndir av íbúðunum á www.123hjemmeside.dk/frifra


## Sløkkiliðsfólk
### til Fuglafjarðar sløkkilið

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir leysum sløkkiliðsfólki M/K til Fuglafjarðar sløkkilið til setan **1. desember 2008** ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skal hava heilsuváttan, revsiváttan og stóra koyrikortið. Tó kunnu persónar, sum ikki lúka krøvini fyri koyrikorti, søkja størvini við teirri treyt, at hetta verður fingið til vega skjótast, um teir verða settir í starv.

Somuleiðis verður kravt, at umsøkjarar antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsfólkum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Møguligir umsøkjarar skulu verða búsitandi í Fuglafirði ella Kambsdali og skulu arbeiða í økinum.

Nærri upplýsningar um størvini eru at fáa frá brunastjóranum Jóhann Clementsen á telefon 737800.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi fríggjadagin **7. november 2008 kl. 15.00.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 16. oktober 2008*

**Fuglafjarðar kommuna**




## GANGA Í ÍSLANDI

**Tilkomin fólk ganga eftir Laugarvegnum til Þórsmørk**

**foroyar.net**


## KUNNGERÐ

**Vísandi til kunngerð frá Løgmálaráðnum, dagfest 23. september 2008, so fer kommunuval fram týsdagin tann 11. november 2008.**

Valið til býráðið fyri Fuglafjarðar kommunu fer fram soleiðis, at
- Veljarar í Fuglafirði og Kambsdali velja í býráðssalinum í Fuglafirði og
- Veljarar á Hellunum velja í Bønhúsinum.

**Atkvøðutíðin verður:**
Kl. 10.00-20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og tá ið valið verður lýst liðugt.

**Brævatkvøður:**
Sjófólk og onnur, sum ikki rokna við at verða heima valdagin, og veljarar, sum eru staddir uttanlands, kunnu greiða brævatkvøðu í fyrsta lagi 4 mánaðar áðrenn valdagin.

Í øðrum førum skal brævatkvøðan verða avgreidd í fyrsta lagi 1 viku áðrenn valdagin, (tað er 4. november 2008) og í seinasta lagi dagin fyri valdagin við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 737700.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi áðrenn valið byrjar **kl. 10.00 tann 11. november 2008.**

**Heimaval:**
Veljarar, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu møta á valstaðnum, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða býráðsskrivstovuni frá hesum áðrenn kl. 15.00 mánadagin tann 10. november 2008.

**Valkort:**
Valkort verða send við postinum, sí annars kunngerð í bløðunum um hesi viðurskifti.
Um onkur, ið heldur seg hava valrætt í kommununi, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi vinarligast biðin um at venda sær til býráðsskrivstovuna.

Minnist til at hava valkortið við á valstaðið.

*Fuglafjørður, tann 16. november 2008*

**Kommunuvalnevndin**
*Arnold Abrahamsen*
*formaður*

## Kunngerð

Gjørt verður við hesum kunnugt, at vallistin til kommunuvalið 11. november 2008, liggur frammi til alment eftirlit í húsa skúla, frá 14. oktober 2008 til 28. oktober 2008.

Kæra um, at onkur ikki er komin á vallistan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera valnevndini ella bygdarráðnum í hendi innan **týsdagin 4. november 2008.**

**Húsa sóknar kommuna**

TVØROYRAR KOMMUNA

## Stuðul til barnaansingina í Suðuroy

**Søkt verður eftir stuðli til 5 ára gamalt barn at byrja skjótast gjørligt.**

Arbeiðsøkið er Dagstovnurin Mýrifípan í Trongisvági, fyrrapartar og Spælistovan hjá Dagrøktini í Sumba, seinnapartar.
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.
Arbeiði krevur, at tú skalt koyra barnið til og frá Mýrifípuni og Spælistovuna.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur eina námsfrøðisliga ella aðra viðkomandi útbúgving
- At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert tolin og vísir umsorgan
- At tú dugir at síggja møðuleikar frammum forðingar
- At tú hevur virðing fyri børnunum, foreldrum og starvsfeløgum
- Tú verður ein partur av einum tvørfakligum toymi.

Tín arbeiðsuppgáva fevnir um at stuðla og menna barnið, og fylgja teimum tiltøkum, ið eru/verða sett í verk uttan fyri heimið, t.d. fara til venjingar.

Lønin er sambart sáttmálað við avvarðandi fakfelag og KAF ella Fíggjarmálastýrið.

Umsókn, saman við prógvi og viðmælum, verður at senda til Dagstovnin Mýrifípan, Smærugøta 8, 826 Trongisvágur innan **fríggjadagin 24. okt. kl. 12**

Um ongin við viðkomandi útbúgving søkir starvið, verður hjálparfólk sett í staðin.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Guðruna Petersen, Leiðara í Mýrifípuni, tlf 372700 ella Súsonnu Poulsen, leiðara í Dagrøktini, tlf 281339


## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480